ikki í gildi

# AVTALA

Dagf.: ..............



Millum

P/F Eystur- og Sandoyartunlar, EST, ið kemur at verða umboðað av Teiti Samuelsen, tlf 231000, teldupost tesa@estunlar.fo

og

**Tórshavnar Havn, TH, (móttakari),** ið kemur at verða umboðað av Jónsvein Lamhauge, tlf 311762, faltlf. 611764, teldupost, jonsvein@torshavn.fo.

er gjørd hendan avtala um

**tilfar úr Eysturoyartunlinum, Streymoyar megin:**

1. P/F Eystur- og Sandoyartunlar letur tilfar úr Eysturoyartunlinum, sum TH bindur seg til at taka ímóti. Grótið verður latið til útfylling eystanfyri havnarøkið á Sundi ella á verandi havnarøki eftir nærri avtalu.

2. Samlaða tøka grótið liggur um 377.000 $m^3$ í føstum máti og av hesum fær TH uml 310 – 377 $m^3$ í føstum máti. Nøgdirnar kunnu ikki fastleggjast, tí tilfar skal eisini latast til innkomuvegin til Tórshavn uml 67.000 $m^3$ í føstum máti.

3. Roknast skal við, at grótið verður koyrt úr eini millumgoymslu við tunnilsmunnan við Hvítanes eftir nærri avtalu millum partarnar.

4. Tilfarið verður latið í tann mun, tað er tøkt, alt eftir hvussu arbeiðið við tunlinum fer fram. Tilfarið verður latið soleiðis, sum hetta er háttað, eftir at tað er sprongt úr tunlinum. Um TH skal taka ímóti tilfari av ivasamari góðsku sum ikki er vælegnað til uppfylling, skal hetta gerast eftir nærri avtalu.

5. Móttakarin hevur skyldu til, at økið altíð er tøkt til móttøku umframt at øll vanlig myndugleika loyvir eru í lagi Fyrivarni verður tikið fyri, at býarskipanarnevndin hjá landinum havnar, broytir ella fær í langdrag planlagda broyting í býarskipanini, og harumframt verður fyrivarni tikið fyri, at byggilovi verður játtað til ætlaðu útfyllingina. Loyvi til útfyllingina er fingið til vega frá Yvirfriðingarnevndini og Umhvørvisstovuni.

6. Eru viðurskifti sum gera, at TH ikki tekur ímóti tilfarinum, sum avtalað, kann tilfarið verða latið øðrum móttakara, og avtalaða nøgdin verður minkað tilsvarandi.

7. Kostnaðurin er 23 kr/$m^3$ í føstum máti og kostnaðurin verður býttur soleiðis:
   TH: 10/17
   EST: 7/17

8. TH vísir á, hvar grótið skal lessast av, og leggur sjálv út eftir tí skapi hon ynskir. Verjugrót, rør, brúgvar o.l. tekur TH sær av. Í byrjanini verður nøgdin tilpassað innleiðandi arbeiðunum, soleiðis at atkoman kann skipast nøktandi.

9. Áðrenn arbeiðið byrjar, verður byrjanarfundur hildin millum partarnar, so avtalast kann meira neyvt, hvussu veiting og móttøka verður skipað.

10. Uppgjørt verður eftir teoretiskum í føstum máti pr.$m^3$

11. Veitingin av gróti kann eftir ætlan byrja 01.02.2017 og annars eftir avtalu. Samanhangandi veiting skal ikki vera minni enn 1 mánaða í senn, um annað ikki er avtalað. Spreingiarbeiðið er mett at taka uml 2 – 2,5 ár

12. Tilfarið verður goldið við ávegis gjøldum, sum verða goldin eina ferð um mánaðin, tá ávegis uppgerð verður send móttakarunum. Ávegis gjaldið er latin nøgd ($m^3$) faldað við einleikaprísinum umframt MVG. Endalig avrokning fer fram við mánaðarenda, mánaðin eftir at samlaða nøgdin er veitt

13. Tilfarið er ætlað til umrøddu arbeiði hjá móttakaranum og má ikki latast ella seljast øðrum, uttan eftir góðkenning frá EST.

14. Avtalan verður undirskrivað í 2 eintøkum og fær hvør parturin sítt.

**Fyri Tórshavnar Havn**

Staður........................................

Dagfesting....................................

Undirskrivt...................................

**Fyri P/f Eystur- og Sandoyartunlar**

Staður....Tórshavn..........................

Dagfesting....9/1-16........................

Undirskrtivt..................................

Ikki galdandi